

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 36
Apríl 2018

ISSN 1603-0036

- Fyrri heimsbardagi - krígslok 1918
- Regin Dahl 100 ár
- Føroysk klæðir III
- Jólafrímerki: Halgimyndir
- Ársins frímerki 2017

Posta
FAROE ISLANDS







FO 889-892 Royndarprent

# Fyrri heimsbardagi - krígslok

Enn vóru ongi útlit fyri friði. Fýra krígsvetrar vóru nú farnir, við vanlukkuligum fylgjum fyri heimin og serliga tey stríðandi londini. Niðri í Evropu herjaðu álopini aftur og fram yvir vígvallir, ið longu frammanundan vóru oyddir av eirindarleysum eljustríði. Vestara hermótið rakk, sum eitt blóðgað arr, úr Flandern fyri norðan til Schweiz fyri sunnan. Blóman av evropiska unglingaliðinum lá deyður ella løstaður á vali – meðan teir ið higartil vóru komnir undan við lívinum, tyrptust saman í og handan skotgravirnar, útlúgvaðir av miskunnarleysum baksi og stríði.

Stígur var komin í kríggið – partarnir vóru snøgt sagt ov javnir. Generalar og politikarar sótu við einari høpisleysari og syndarligari kreppu: teimum væntaði ungar menn at fylla holini í hernaðarliðunum.

**Týska váratsóknin í 1918**

Týska herstjórnin stóð yvirfyri einum nýggjum vandamáli. USA hevði umsíður lagt seg út í stríðið – og hóast amerikumenn høvdu ómetaligar byrjanartrupulleikar, fóru amerikonsku herliðini at verða ein álvarsom hóttan í longdini – ein hóttan, ið týskarar ikki kundu loyva sær at skúgva til viks.

Men oktoburkollveltingin í Ruslandi í 1917 førdi við sær, at russar vildu taka seg úr krígnum. Friðarsáttmáli varð undirskrivaður landanna millum og tað gjørdi, at nær um ein millión týskir hermenn nú vóru tøkir at flyta til vestara hermót. Týskland hevði nú munandi fleiri hermenn og hereindir enn teir sameindu, og herstjórin, Erich Ludendorff, miðaði nú eftir at fremja eitt stórálop, fyri at gera enda á krígnum áðrenn amerikonsku herliðini vórðu til reiðar at stríðast.

**Michael-atsóknin**

Tann 21. mars klokkan 4.40 um morgunin, byrjaði sokallaða Michael-atsóknin norðanfyri franska býin Saint-Quentin, við ógvusligum kanónskotríðum frammanundan einum stórálopi av servandum herdeildum. Týskarar brutu seg kvikliga ímillum bretsku og fronsku herliðini og róku bretar undan sær. Um kvøldið hendan fyrsta dagin, høvdu týskarar



Málningur av samráðingunum millum týskarar og teir sameindu

troðka seg uml. 65 kilometrar inn á franskt øki.

Teir sameindu lagaðu seg tó brátt til týska taktikkin, lótu týdningarleys mál frá sær uttan stríð og bardust sum úlvur á skóg fyri mál av strategiskum týdningi. Hetta, saman við sannroyndini, at týskar gingu so skjótt fram, at hvørki útgerðar-, proviant- ella kanóndeildirnar megnaðu at fylgja við, tók broddin av álopinum. Við tey strategiskt týðandi jarnbreytarmótini eystanfyri býin Amiens við ánna Somme, savnaðust bretskar og australskar herdeildir og steðgaðu týskarum. 5. apríl steðgaði Ludendorff generalur atsóknini, eftir nakrar miseydnaðar royndir at taka Amiens. Týskarar høvdu tá tikið rættuliga stór landaøki, men uttan stórvegis strategiskt virði.

**Georgette-atsóknin**

Næsta stig í týska hernaðarátakinum kom tann 9. apríl , við einum álopi við býin Hazebrouck norðuri í Flandern í Belgiu. Michael-atsóknin hevði noytt bretar at flyta herdeildir suður móti Somme – og Georgette-atsóknin var ætlað at nýta høvið at kvetta bretska flutningskervið. Hazebrouch var jarnbreytarmótið til havnarbýirnar Dunkirk, Calais og Boulogne, har bretar uppskipaðu hernaðarútgerð og hermenn. Men týskurin hevði enn einaferð logistiskar trupulleikar og eftir ógvusligt stríð við portugisiskar, bretskar, nýsælendskar og avstralskar herdeildir, varð álopið steðgað uttanfyri Hazebrock.

**Blücher-Yorck-atsóknin**

Triðja týska stórálopið byrjaði tann 27. mai millum býirnar Soissons og Reims, fyri sunnan. Verjutiltøkini í økinum vóru sjáldsama illa fyriskipað og ikki fullførd – og týsku kanónskotíðurnar fóru illa við sameindu herdeildunum, sum noyddust at trunka seg saman í fremstu skotgravunum. Hóast mótálop av fronskum og bretskum herliðum, tóku týskar seg fram til ánna Marne, uttan stórvegis hóvasták. Tað førdi við sær at París nú stóð fyri hóttafalli.

Men enn einaferð hevði týskurin lagt ov nógv fyri. Stór landaøki vóru vunnin, men uttan stórvegis strategiskan týdning. Logistikkurin


THIS IS CANADA'S LAST LOAN AT 5 1-2 PER CENT! TAKE ALL YOU CAN! THERE MAY NEVER BE ANOTHER CHANCE LIKE IT IN YOUR GENERATION

Forecast: Fair and Cool

The Citizen

OTTAWA, CANADA, MONDAY, NOVEMBER 11, 1918

PEACE!

WORLD WAR ENDS; ARMISTICE SIGNED; KAISER IS OUT; REVOLUTION GROWS

ARMISTICE WILL TAKE EFFECT AT SIX A.M. TODAY

BRUSSELS ALMOST WITHIN RANGE OF THE BRITISH GUNS

Haig's Men Have Crossed the Franco-Belgian Border

“PEOPLE'S GOVERNMENT” ESTABLISHED IN BERLIN APPEARS TO HAVE TRIUMPHED

KAISER AND HIS DYNASTY RENOUNCE THRONE; A SOCIAL REPUBLIC IN PROCESS

*Forsíðan av kanadisku avísini The Citizen*

sveik og áhaldandi mótálop tærdu teir útlúgvaðu týsku hermennirnar.

Í juli varð týska stóratsóknin fullkomiliga steðgað – og tað gav teimum sameindu rásarúm at koma fyri seg aftur – og at fáa nýggjar herdeildir og útgerð upp á pláss.

**Hundraðdaga atsóknin**

Ímeðan vórðu fronsku og bretsku herdeildirnar endurreistar. Bretar fluttu herdeildir úr Miðeystri og Italiu upp til vesturhermótið og nýkallaðir hermenn komu heimanífrá fyri at fylla holini í illa farnu divisjónunum.

Í loyndum savnaðu teir sameindu sínar herdeildir við Amiens og fyrireikaðu seg til mótálop. Avstralskar serdeildir høvdu í longri tíð framt spjadd sniðálop á týsku skotgravirnar og gjørt ónáðir, fyri at troytta týsku hermenninar og bloyta hermótið upp. Tann 8. august 1918, lupu 10 divisjónir av kanadiskum, avstralskum, bretskum og fronskum herdeildum, á týska hermótið - stuðlaðar av 500 stríðsvognum. So stillisliga høvdu teir sameindu fyrireikað álopið, at tað tók týskin á bóli. Sameindu herdeildirnar tóku seg langt inn á nývunnað týska økið og 10. august fingu týsku deildirnar boð um at taka seg aftur til sokallaðu Hindenburg linjuna við gamla hermótið.

21. august leyp 3. bretski stórherurin á við Albert, meðan 10. franski stórherurin leyp á Noyon fyri sunnan. 26. august varð álopið víðkað norðureftir, har 1. bretski stórherurin framdi annað álopið á Arras.

Og soleiðis gekk tað, ein orrusta fyri og onnur eftir – við einari áhaldandi røð av álopum á týsku verjugarðarnar. Nú vóru amerikonsku herdeildirnar eisini stríðsbúnar og tann 29. septembur lupu teir sameindu á ta annars so ógongdu Hindenburg linjuna. 8. oktobur komu teir ígjøgnum Hindenburg linjuna í øðrum bardaganum um Cambrai og róku týsku herdeildirnar aftur gjøgnum tey landaøki, sum týskurin hevði vunnið í 1914. Tað var nú greitt fyri týsku herleiðsluna, at kríggið var tapt. Týskurin hopaði áhaldandi undan og

noyddist at leggja stórar mongdir av útgerð eftir sær. Moralurin í týsku herdeildunum var slitin í botn - og heima í Týsklandi var álvarsamur ófriður orsakað av krígnum, sum øll vistu stóð fyri tapi. Týsku generalarnir skumpaðu ábyrgdina fyri friðarsamráðingarnar yvir á teir politikarar, sum teir annars ikki høvdu lurtað eftir – allarhelst fyri sjálvir at sleppa undan at viðganga ósigur.

Ein týsk sendinevnd av politikarum hitti umboð fyri teir sameindu í Compiègne skóginum, einar 60 kilometrar norðanfyri París. Týskurin var møttur við ómildum krøvum fyri frið, m.a. at Týskland skuldi taka seg úr øllum hersettum landaøki og lata ovurstórar mongdir av stríðsútgerð til teir sameindu. Týska sendinevndin hevði ikki annað í at velja, enn at góðtaka tey umfatandi krøvini og skriva undir avtalu um vápnahvíld um morgunin tann 11. novembur. Hettar merkti, at vápnahvíldin kundi setast í verk 6 tímar seinni, klokkan 11:00 tann 11. novembur 1918. Hóast veruligar friðarsamráðingar ikki skuldu haldast fyrr enn seinni, merkti vápnasteðgurin, at fyrri heimsbardagi í roynd og veru var av.

**Kvinnur í krígnum**

Nýggja slagið av krígsførslu og tað stóra talið av hermonnum sum luttóku í bardøgunum, førdi við sær stórt trot á røktarstarvsfólki. Hetta var galdandi fyri sjúkrahús í heimlondunum, hersjúkrahús handan hermótið og fyrstuhjálpstøðum við sjálvan vígvøllin. Flestu stríðandi londini høvdu yrkissjúkrasystrar knýttar at hernaðarsjúkrahúsunum, men tað vísti seg skjótt ikki at røkka til.

Bretska hernaðarvaldið góðtók t.d. fyrst í krígnum, bara teirra egnu sjúkrasystrar á hersjúkrahúsunum. So sjálvbodnir felagsskapir, sum FANY (First Aid Nursing Yeomantry), sendu í staðin teirra kvinnuligu starvsfólk í tænastu hjá belgisku og fronsku herdeildunum. Tær vóru lættar at kenna á tí hernaðarlíknandi búnanum. Umframt at starvast á hersjúkrahúsunum, koyrdu FANY kvinnurnar eisini ambulansur og veittu fyrstuhjálp stutt frá hermótinum.

Kendasti felagskapurin var tó "Voluntary Aid Detatchments", oftast kallaður VAD, sum umfataði sjálvbodnar menn og kvinnur. VAD kvinnurnar vóru mest óskúlaðar ungar kvinnur, ið hjálptu yrkissjúkrasystrunum við at átaka sær partar av uppgávunum, sum røkt, reingerð, flutning og endurvenjing.

Onnur lond, sum t.d. Kanada, høvdu yrkissjúkrasystrar innskrivaðar beinleiðis til herdeildirnar. Hesar sjúkrasystrar, vanliga róptar "Bluebirds" orsakað av bláa búnanum og hvíta slørinum, høvdu stig sum loytnantar og kundu flytast upp í tign, júst sum vanligir offiserar.

Tað var ikki vandaleyst at starvast við hermótið. Eitt stórt tal av kvinnum frá øllum stríðandi londum lótu lív av krígsávum og avtí herviligu sponsku sjúkuni, sum herjaði Evropu í 1918.

Á frímerkinum sæst fremst ein kanadisk sjúkrasystir, ein kvinnuligur ambulansuførari úr FANY og í bakgrundini ein belgisk sjúkrasystir.

**11. tímin hin 11. dagin í 11. mánaði - og nær um 11.000 falnir og særdir.**

Avtalan um vápnahvíld varð undirskrivað tann 11. novembur 1918, eitt sindur yvir klokkan 5 um morgunin. Semja var um, at steðgurin skuldi setast í verk klokkan 11 sama dag.


LA DÉPÊCHE

JOURNAL DE LA DÉMOCRATIE

Mardi 12 Novembre 1918

LA GUERRE EST FINIE

L'Armistice a été signé ce matin

LES HOSTILITÉS ONT CESSÉ A ONZE HEURES

Paris, 11 novembre (officiel). — L'armistice a été signé ce matin, à six heures. Les

Les Conditions faites au Vaincu

Les derniers Coups de Canon

Comment le Coupable s'échappa

*Forsíðan av fronsku avísini La Dépêche*

Teir seks tímarnar frá tí at avtalan varð undirskrivað og til vápnahvíldin byrjaði, vórðu tíanverri nýttir til at vinna best møguliga støðu. Úrslitið var, at næstan 11.000 (10.944) mans lógu eftir á - 2.738 av teimum lótu lív.

Ræðuliga kríggið var av. Teir, ið komu frá tí við lívinum kundu fara heim – mangir við herviligum løsti og fleiri við kvølfullum minnum um eina ta størstu vanlukkuna, mannaættin hevur drigið inn yvir seg sjálva. Men teir vóru hóast alt á lívi.

Aðrir vóru ikki líka hepnir. Teir vórðu jarðaðir í ta fremmandu jørð, teir høvdu stríðst so hart fyri. Allan vegin framvið gamla hermótinum í Belgiu og Fraklandi, liggja risastórir hernaðarkirkjugarðar, har gravsteinarnir standa í snórabeinum røðum. Tigandi varðar yvir ungar menn, ið ikki sluppu at liva tað lív, teir høvdu uppiborið.

Tveir hermenn, ein týskur og ein bretskur, bera ein franskan hermann á børu frá einum frímerki til hitt. Spurningurin er so, hvørt ungi maðurin endaði millum teir, ið sluppu heim, ella fekk pláss í tigandi hvítu fylkingini.

Seinasta frímerkið er serliga kveikt av yrkingini "In Flanders Fields", hjá kanadiska læknanum og yrkjaranum John McCrae, frá 1915. Myndevnið bendir tó eisini á ein yngri kendan mótmælissang – men tað lati eg standa til tín at gruna yvir.

*In Flanders fields the poppies blow*
*Between the crosses, row on row,*
*That mark our place; and in the sky*
*The larks, still bravely singing, fly*
*Scarce heard amid the guns below.*

*We are the Dead. Short days ago*
*We lived, felt dawn, saw sunset glow,*
*Loved and were loved, and now we lie*
*In Flanders fields.*

*Take up our quarrel with the foe:*
*To you from failing hands we throw*
*The torch; be yours to hold it high.*
*If ye break faith with us who die*
*We shall not sleep, though poppies grow*
*In Flanders fields.*

*Anker Eli Petersen*

Amerikanskir hermenn í bardaga 1918









FO 893

Royndarprent

# Regin Dahl 100 ár

Í ár eru 100 ár síðani at Regin Dahl (1918-2007) yrkjari, tónleikari og týðari varð borin í heim í Sandágerði. Hann tók studentsprógv á Sorø í 1937. Lívsstarvið hjá honum var hjá danska forlagnum Gyldendal sum forlagsráðgevi.

Regin Dahl fekk Mentanarvirðisløn M. A. Jacobsens bæði í 1973 og í 1979. Hann er eisini kendur í Føroyum fyri at hava endurnýggjað føroyskan tónleik.

Kom málsliga tilvitið frá pápanum Jákup Dahl, prósti, so kom tað musiska sinnalagið hjá Regini frá mammuni, ið var kenda tónleikalærarinnan Maria Dahl, dóttir Bakar Hansen (Georg Caspar Hansen og Mariannu Jacobsen).

Regin las fagrar bókmentir og norrønt í Keypmannahavn. Tá hann var átjan ára gamal gav hann út fyrsta yrkingasavnið "í útlegd". Hann yrkti her um útlegdina, ið er eitt afturvendandi tema í hansara skaldskapi, mest tí hann alt lívið var útiseti. Fyrstu yrkingarnar komu í Varðan í 1936. Eftir hetta skrivaði hann átta søvn.

Regin kom at endurnýggja føroyska yrking. Heitini til søvnini eru egin og sýna málsligt tilvit, so sum "Beltisgyrði", ið er bandið, sum bakkamenn hava um miðjuna at heingja fuglin í, "Gongubitar", ið eru bitar, ið menn høvdu við sær í hagan, t.d. á fjalli, "Eftirtorv", ið er torv, sum sløðist eftir á heiðini.

Tá annar heimsbardagi brast á, var ikki longur samband millum Danmarkar og Føroya. Regin var ein av hesum unglingunum, ið var staddur í Danmark í lestrarørindum. Eftir krígslok í 1945 komu tey flestu aftur, men Regin varð verandi.

Tá Hitt Føroyska Studentafelagið í Keypmannahavn hevði ársdag í 1966, kom út eitt rit. Her skrivar Regin, at ein akademikari, er ein sum er djarvur frælsur, livur sum "ein mistrivningur" og ein heppin drongur, tí hann



Signar á Brúnni landstýrismaður í mentamálum handar Regini Dahl Mentanrvirðisløn Landsins í 1998
Mynd: Jens Kristian Vang

lærir at lesa og at fara um bøkur og tí lærir hann at hugsa. At enda spyr Regin, "Torir tú? Einsamallur sum einstaklingur? At vera frælsur og sannur? Regin krevur at akademikarin er ein einstaklingur, sum kann liva við einum strangleika og krevja at lívið skal geva meining.

Regin var estetikari, yrkjari, tónleikari, týðari og mangt annað. Hann var kendur í Danmark fyri at týða yrkjaran Baudelaire til danskt.

Regin hevði longu frá skúlatíðini á Sorø Akademi vinir í Danmark, ið seinni gjørdust kendir. Ein av hesum var Ole Wivel, seinni forlagsstjórin á Gyldendal. Regin fekk ein týðandi leiklut í bólkinum rundan um Wivel, danska tíðarritið Heretica og forløgini bæði - Wivelsa og Gyldendal. Wivel tók til um Regin:

*"Regin Dahl sum varð roknaður millum kjarnuliðið – uttan kommentarir – hitti eg seint á sumri í 1946. Hann var føroyskur yrkjari, hevði gingið á Sorø Akademi saman við Bjørn. Regin læs tónleik á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn og minti í útsjónd - og í sinnalag – um Baudelaire. Lítil, myrkur, við einum rundleiddum høvdið og hárdoddar, ið altíð duttu oman pannuna, hann var fimur og gjøgnumsúrgaður av musikaliteti, ein sannur orðasnillingur og brennivínselskari við einum norrønum tunglyndi og elskovsleiddum longsli eftir oyggjum sínum í Atlantshavinum, soleiðis var hann øðrvísi enn øll onnur, eg hevði møtt."*

Regin Dahl var sum forlagskonsulentur við til at skriva danska bókmentasøgu, samstundis sum hann sjálvandi eisini endurnýggjaði føroyska yrking, tónleika-, menta- og bókmentasøgu.

Í 1998 fekk Regin Dahl Mentanarvirðisløn Landsins.

*Kim Simonsen*






FO 894-895 Royndarprent

# Føroysk klæðir III

**Kýsi og húgva**

Í triðju og seinastu útgávuni um føroyska tjóðbúnan, eru vit nú komin til høvuðbúnan.

**Kvinnubúnin**

Siður var hjá føroyskum kvinnum, sum annars í Evropu, at brúka ein sokallaðan kýsa. Kýsin er eitt slag av nakkahúgvu ið fjalir skallan, nakkan og part av vanganum niður á oyra - men ikki pannuna. Høvuðbúnin er kendur úr miðøld, tá bæði menn og kvinnur brúktu kýsa. Hjá monnum var hann statusímynd - riddarar brúktu ein tjúkkan kýsa undir hjálminum, fyri at javna árin av brestum móti høvdinum. Eisini uttan hjálm brúktu teir kýsa, fyri at gera vart við at teir vóru júst riddarar. Siðurin breiddi seg til menn við vandaleysari starvi, tó við tynri kýsa. Hjá kvinnum var kýsin heldur ein ímynd av blúgv. Siðiligar konur gingu ikki hattleysar, nakað ið enn gongur aftur í konservativum kristnum trúðarbólkum sum hjá menonitum og amishfólki.

Tá eg var barn, bóru kvinnuligu offiserarnir í Frelsunarherinum eisini smáar svartar kýsar, sum part av búnanum.

Praktiska endamálið við kvinnukýsanum var tó at verja hárið móti regni, vindi og veðrinum sum heild. Eftirsum sólin ikki var nakar trupulleiki fyri føroyskar kvinnur, var tann, annars so kendi, europiski kýsin við sólskermi, ikki serliga vanligur. Í staðin var tveystykkiskýsin, ið er avmyndaður á frímerkinum nýttur. Kýsarnir vóru yvirhøvur myrkir, tó ymsir á liti. Teir vórðu festir við silkibondum - ungar gentur brúktu reyð, meðan eldri kvinnur brúktu blá silkibond. Einkjur brúktu myrkablá bond fyri at lýsa sorgina. Keldurnar nevna eisini marglitt bond, men tey hava helst ikki verið serliga vanlig.

Nú á døgum er kýsin ikki longur vanligur hjá kvinnum í tjóðbúna. Tó er hann framvegis partur av útgerðini hjá smágentum.



Maður og smádrongur í føroyskum klæðum
Mynd: Jógvan Hansen

**Mannfólkabúnin**

Ein tann mest eyðsýndi luturin í mannfólkabúnanum er húgvan. Ein heingihúgva í ætt við fronsku jakobinarahúgvuna – og ikki at blanda við fínaru stavnhettuna, sum kemur fyri á einum føroyskum frímerki frá 10.04. 1989. Føroyska húgvan var vanliga gjørd úr hvergarni. Hon er antin reyð- ella bláspølað – bláa frábrigdið vanligast fyri eldri menn. Ovast er húgvan rykt saman við 13 rukkum ella føllum, ið gera kollin flatan.

Nú á døgum verður kollurin lagdur saman og festur í húgvuvangan – og húgvan borin sum hernaðarliga spísshúgvan, við hvassari møn aftur og fram. Menn eru ikki á einum máli um, hvønn veg kollurin skal hella - men vanligast er at hann hellur til vinstru, so ein kann lætta húgvuna við vinstru hond og heilsa við høgru. Fyrr í tíðini var kollurin ikki festur – og á gomlum myndum sæst, at tað var rættuliga tilvildarligt hvønn veg húgvan vendi. Eg minnist frá barndóminum ein gamlan mann, ið bar tubbakkið í húgvuni – men hvussu vanligt tað var at nýta húgvukollin til lumma, veit eg ikki.

Og hervið eru vit komin at enda við frímerkjarøðini hjá Edward Fuglø. Gerandisklæði úr nitjandu øld, ið gjørdist nútíðar gallabúni, brúktur av bæði ungum og gomlum til veitslu- og hátíðarløtur.

*Anker Eli Petersen*






FO 896-897

Royndarprent

# Jólafrímerki: Halgimyndir

Ikonurin (halgimyndin) hevur heimstað sín í ortodoksu kirkjuni, eysturkirkjuni, ið er øll prýdd við ikonum. Har hevur hann ein týðandi leiklut undir gudstænastuni, eins væl og í gerandislívinum hjá teimum ortodoksu kristnu. Í ortodoksum heimum standa ikonar í "vakra horninum", ið vendir móti eystri. Har verða kertir kveiktar, og har verða bønir bidnar. Tað eru tó mong menniskju, sum hava røtur í øðrum kirkjum, ið hava tikið ikonarnar til sín. Áhugin fyri ikonum er støðugt vaksandi.

Ikonurin (grikska orðið "eikon" merkir mynd ella avmynd), ber boð um Guds nærveru. Hann hevur grund sína og haldgóða støði sítt í tí veruleika, at Gud klæddist í hold og varð menniskja í Jesusi Kristi. Ikonurin verður ikki tilbiðin, men æraður. Kirkjufaðirin, Jóhannes í Damaskus, sigur: " Tað er ikki materiuna (tilfarið), ið vit æra, men skaparan av materiuni (tilfarinum), sum vegna frelsu okkara varð materia (hold)". Á kirkjufundinum í Nikæa (787) verður sagt og staðfest við ikoninum í huga: "at ikonurin er innblástur av hinum Heilaga Anda, sum livir í honum, og at eins og hin heilagi og lívgevandi krossurin, so á sama hátt átti hin heilagi og dýrabæri ikonurin, málaður við litum, tilevnaður úr smáum steinum ella einum hvørjum øðrum tilfari, sum tænir hesum endamáli, at verði settur inn í tær heilagu kirkjur Guds, á veggir og borð, í húsum og á gøtum, hvørt hesir eru ikonar av Harra okkara, Gudi og Frelsara, Jesusi Kristi, ella okkara lítaleysu hægstu Frú, hini heilagu Gudsmóður, ella teimum heilagu einglum ella æruverdum menniskjum. Tí at heiðurin givin myndini, verður givin ímynd hennara, og tann, ið hávirðir ein ikon, hávirðir tann, sum ikonurin avmyndar".

Ikonurin ber í sær eina vakurleikans gudfrøði. Hann boðar kirkjunnar trúarlæru og evangelium við litum, formum og linjum. Her er talan um stillisliga ella ljódliga boðan. Ikonurin er fyri eygað, tað, sum orðið er fyri oyrað. "Tað, sum orðið boðar við ljóði sínum,



Gamal russiskur ikonur frá 1786 (halgimynd).
Mynd: Fotostudio

tað sýnir ikonurin tigandi" sigur kirkjufaðirin, Basilius hin Stóri.

Tað verður stundum ført fram, at ikonurin er eitt vindeyga móti Guds dýrd. Ikonurin ber boð um Guds ríki og harvið eina umbroytta mannaætt og ein endurnýggjaðan alheim. Tað skínandi gullið á ikoninum ber boð um Guds dýrd, ævinleikan, har alt er ljós. Ella, sum tað verður sagt í ortodoksu kirkjuni, ber boð um "áttanda dag", "dagin uttan enda, dagin uttan kvøld, ævinleikan uttan aldur, sól uttan sólsetur".

**Arvurin úr Byzans**

Við hesi málisku verður eitt nú hugsað um myndlistina í eysturkirkjuni. Longu í fjórðu øld var ikonografiin fullment í Byzans. Tá Rusland tók við kristnari trúgv (988) komu ikonmálarar úr Konstantinopel til Ruslands við tí fyri eyga at læra russar handverkið. Myndlistin í eysturkirkjuni kemur í hæddina í Ruslandi í 15 øld við ikonmálaranum Andrei Rublev.

Arvurin úr Byzans er eisini komin til Føroyar. Hesi seinastu árini hava nakrar føroyskar kvinnur lært seg at mála – ella rættari at "skriva" ikonar, seinast úti í Mikinesi, har súlan hevur heimastað sín.

Russiski ikonurin frá 1786, sum er avmyndaður á frímerkinum avmyndar Gudsmóðir (Theotokos), sum er eitt tað kendasta motivið. Tað er siðvenja í Ruslandi, at í samband við brúdleyp fær brúðurin ein ikon við Gudsmóðir í brúdleypsgávu.

Carl Niclasen keypti tann russika ikonin í 1970 frá Curt Berndorff Antikviteter í Keypmannahavn.

*Meinhard Bjartalíð*




Royndarprent




# Postgjaldsmerki 2018: Vitar

Ein ljósglæma í norðuratlantiska náttarmyrkrinum – og sjálvt tann mest svøvntyngdi róðursmaðurin ressast og starir alvakin út í náttina. Jú, har var tað aftur! Eitt blunk í tvey – trý sekund, ella ein malandi ljósglæma, ið strýkur yvir bylgjurnar har úti í havsbrúnni - og javnan rakar einsamalla sjómannin á brúnni.

Og tað er ikki uttan orsøk, at róðursmaðurin gerst ansin. Hann veit at ljósglæman er ein ávaring – fyri framman liggja Føroyar, har miklir stakkar og bjørg standa steyrrætt úr havinum og boðar og sker hótta ósketnar sjómenn í havfløtuni. Tær vøkru, men eisini svikaligu oyggjarnar, har aldargomul skipsrov liggja sløðd á havsins botni, tí farnir róðursmenn ikki vórðu varskógvaðir av teimum vælsignaðu ljósglæmunum.

Í dagsljósi avdúkast ljóskeldurnar. Margháttlig reyð- og hvítmálað torn, oftast í óblíðum brattlendi, sum vitin á Slættanesi, vitin í Nólsoy og vitin á Mykineshólmi – ella sum vitin á Skansanum, settur stutt frá sjóvarmálanum fyri at lýsa fyri innsiglingini til Havnar.

Stóru føroysku vitarnir eru laðaðir úr gróti ella stoyptir í jarni fyri meira enn hundrað árum síðani – og standa sum varðar fyri síðviktorianska ídnaðarsniðgeving. Men hóast teir minna um fremmandan fugl í umhvørvinum, er okkurt tryggjandi við teimum fyri føroyingar flest. Teir eru ein partur av okkara mentanararvi og samleika sum sjóvinnutjóð.

Á postgjaldsmerkjunum síggjast ávíkavíst vitin á Skansanum frá 1909, Nólsoyar viti, vitin á Slættanesi frá 1927 og vitin á Mykineshólmi frá 1909.

*Anker Eli Petersen*

# Ársins vakrasta frímerki 2017

## Nr. 1




## Nr. 2




## Nr. 3




Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2017 og úrslitið gjørdist hetta:

**Nr. 1** gjørdist frímerkið við lítla vakra summarhúsinum og við fossandi Skorá í baksýni. FO 857. Mynd: Saviour Mifsud.

**Nr. 2** gjørdist eisini ein landslagsmynd. Myndin vísir Leitisvatn/Sørvágsvatn. FO 855. Mynd: Eirik Sørstrømmen.

**Nr. 3** gjørdist smáarkið við ævintýrinum "Teir sjey svanirnir" FO 865-866. Listamaður: Li Yunzhong Gravørur: Martin Mörck.

**Hepnu vinnararnir eru:**

1) **Ullint teppi:**
R.P. Dijkstra, Pÿnacker, Niðurlond

2) **Árbók 2017:**
David Massone, Milano, Italia

3) **Postgjaldsmappa I og II:**
Kurt Seling, Montabauer, Týskland

Vit ynskja vinnarunum hjartaliga til lukku og takka øllum, sum tóku lut í atkvøðugreiðsluni.

# Nýggjar útgávur - 24. september og 1. oktober 2018




FO 889-892 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Fyrri heimsbardagi endar** |
| Útgávudagur: | 24.09.2018 |
| Virði: | 4 x 10,00 kr. |
| Nummar: | FO 889-892 |
| Stødd, frímerki: | 42 x 23,52 |
| Stødd, smáark: | 100 x 70 mm |
| Uppseting: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, 0-50 gr. |




FO 893 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Regin Dahl 100 ár** |
| Útgávudagur: | 24.09.2018 |
| Virði: | 28,00 kr. |
| Nummar: | FO 893 |
| Stødd, frímerki: | 52 x 31 mm |
| Uppseting: | Kim Simonsen |
| Prentháttur: | Offset + UV lakk við soft touch |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv til Evropu, 51-100 gr |




FO 894-895 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Føroysk klæðir III** |
| Útgávudagur: | 24.09.2018 |
| Virði: | 18,00 og 20,00 kr |
| Nummar: | FO 894-895 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 26,5 mm |
| Listafólk: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Smábrøv til Europa og til onnur lond, |
| Postgjaldsbólkur: | 0-50 gr. |
| Sjálvklistrandi hefti | |




FO 896-897 Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólafrímerki: Halgimyndir** |
| Útgávudagur: | 24.09.2018 |
| Virði: | 10,00 og 18,00 kr. |
| Nummar: | FO 896-897 |
| Stødd, frímerki: | 26 x 40 mm |
| Listafólk: | Astrid Andreasen og gomul russik ikon |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | La Poste, frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, og smábrøv til Europa, 0-50 g. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Postgjaldsmerki 2018 - Vitar |
| Útgávudagur: | 01.10.2018 |
| Virði: | 4 x 10,00 |
| Listafólk: | Miriam Hinz |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv í Føroyum |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Maður í føroyskari húgvu. Myndatøka: Jógvan Hansen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps